# Havnar Bio

UMMÆLI:

# Dómadagur

## - Telduspælið »Doom 3« sum vanligur filmur

Kim Simonsen



Tað hendir ikki ofta, at eitt blóðugt og óhugnaligt telduspæl verður gjørt til film. Í 1993 kom spælið Doom fram. Tað vóru tey frá id Software í Texas, ið gjørdu hetta spæl. Við hesum fingu vit nærum eitt nýtt slag av spølum. Øll sum hava spælt telduspøl kenna hetta fyrsta veruliga ”First Person Shooter” brølið av einum ”hardcore” spæli, sjálvt um Wolfenstein kom fyrst. Her sær man gjøgnum eyguni á figurinum, meðan man skiftir millum høglbyrsur og maskinbyrsur, ið sorla óhugnalig Alien og muteraði monstur. Seinni kom so Doom 2, ið var eitt gott telduspæl. Tað er so deiligt at splatta slímut ódjór.

Mær dámdi nokso væl spælið Doom 2. Tá so Doom 3 kom, var eg kanska for gamal til at keypa hetta. Men tá eg royndi tað, var eg skelkaður av hvussu ótrúliga óhugnaligt spælið er. Man gongur og melur í óendaligum myrkri á planetini Mars uttan yvirlit, á einum anleggi, har alt møguligt óhugnaligt er farið fram. Eg fekk ein skelk fyri og annan eftir. Doom 3 er eitt tað mest óhugnaliga spælið, ið er havi spælt, men filmurin Doom er bert óvanliga miseydnaður. Søgan er ótrúliga tunn og filmurin er bert gjørdur fyri at vinna pening. Tey sum hava gjørt filmin vita, at spælið er rættuliga kent og elska av teldufólkunum (monnum).

### Mars bla. bla.

Filmurin byrjar á Mars, har ein fornfrøðiligur útgrevstur, er komin fram á eitt ormahol, sum kann brúkast til at ferðast millum Mars og Jørðina. Hesa søguna hava vit líkasum hoyrt ofta fyrr. Tað er kanska eini 200 filmar um framtíðina sum byrja á henda hátt. Søgan í telduspølum kann gott vera vánalig, og spælið gott. Men í einum filmi skal tað vera øvugt, at søgan skal vera góð og so kunnu øll møgulig special effects vera vánalig. Søgan er umráðandi, og í Doom er eingin søga. Allur filmurin er ein long klisje. Klisjein um svaka vísundamannin, ið hevur skapt eitt Frankenstein ódjór. Søgan um menniskjaskapt kaos, at okkara tøkni er okkara undirgongd- ella ”Doom”, ið merkir dómadagur.

Hetta er ein av teimum filmunum, ið eg haldi er tann vánaligasti eg havi sæð. Bert Starship Troopers 2 var verri. Hann sløkti eg aftaná 10 minuttir. Og var ein knøttur í biografinum, ið kundi skift til ein annan film, so hevði eg gjørt tað. Eg vildi heldur sæð tíggju vánaligar filmar sum American Pie 2 og 3, ella Ed Wood enn hetta.

Har Starship Troopers 1 var líka sum ein kitsj útgáva av ”Melrose Place in Space”, so er Doom bara ”Dumb in Space”. Leikarnir eru sera vánaligir. Og sjálvt um eg av og á kom at hugsa um Alien (1979) hjá Ridley Scott, ið er ein genialur og óhugnaligur filmur, so var lítið at koma eftir her. So lítið, at eg skal kýta meg fyri at skriva nøkur orð um filmin. Man skal vera fjeppari

Men um man er ein ”die hard” (Doom hard) fjeppari av spælinum ”Doom”, so er hetta helst ein filmur, ið man skal síggja.

Møguliga eri eg ikki hin rætti at skriva um hendan filmin. Ikki tí mær dámar væl sokallaðar rúmdarfilmar og telduspøl, men eg skilji ikki hendan filmin. So hann fær bert 1 stjørnu av 6.

Nøvn í filminum:
Leikstjórna: Andrzej Bartkowiak
Leikarar:
Dwayne Johnson
Rosamund Pike
Karl Urban.
USA, 100 min. Aldursmark: ikki ásett. Varð frumsýndur í Havnar Bio fríggjakvøldið 4/11.


TÍÐIRNAR:

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu




FRUMSÝNING

History of Violence

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 11.11 | kl. 20.45 | kl. 23.00 |
| Leygardag | 12.11 | kl. 20.45 | kl. 23.00 |
| Sunnudag | 13.11 | kl. 19.45 | kl. 22.00 |




FRUMSÝNING

Doom

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 11.11 | kl. 23.15 |
| Leygardag | 12.11 | kl. 23.15 |
| Sunnudag | 13.11 | kl. 22.15 |




Walter & Trofast

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 11.11 | kl. 18.30 |
| Leygardag | 12.11 | kl. 18.30 |
| Sunnudag | 13.11 | kl. 17.30 |




Legenden om Zorro

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 11.11 | kl. 20.30 |
| Leygardag | 12.11 | kl. 20.30 |
| Sunnudag | 13.11 | kl. 19.30 |




Far til fire gi'r aldrig op!

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 11.11 | kl. 18.15 |
| Leygardag | 12.11 | kl. 18.15 |
| Sunnudag | 13.11 | kl. 17.15 |

KOMANDI FILMUR:




HEIMSFRUMSÝNING

Harry Potter og flammernes pokal

Fríggjadag 18.11. kl. 00.04
kl. 16.30 kl. 19.45 kl. 23.00

www.bio.fo • Telefon 31 19 56